# Linda 5 stjørnur frá VI UNGE



X-Factor vinnarin Linda Andrews hevur fingið allar 5 stjørnurnar frá ungdómsblaðnum VI UNGE.

Hetta er í sambandi við, at Linda gevur út fløguna „Into The Light“.

Blaðið skrivar m.a ”Albummet er, ligesom Linda, en humørfuldt energibombe. Rent faktisk er Linda lidt af en festabe, og det afspejler hendes vinderalbum tydeligt! Hendes liv handler om glæde, dans og musik, og det er hun ikke bange for at vise i de 13 sange, der er på albummet”.

Fløgan fæst til keyps frá týsdegnum 2. juni 2009. Linda syngur eisini sangir úr fløguni í Tivoli hendan dagin frá kl. 18.45.

# Stórur hemari





*Teir tríggir við hemaranum f.v.: Bjarki Petersen, Jóhannes Arge og Petur Midjord*
*Mynd: Eirikur Ólason Simonsen*

Fríggjadagin 22. mai fingu teir tríggir Bjarki Petersen, Jóhannes Arge og Petur Midjord ein stóran hemara suður úr Kaplinum, sunnan fyri Borðuna, við eini línu upp á 24 húkar.

Talan er um ein hannhemara, sum vanliga eru minni og viga minni enn hon-hemarar. Hemarin, sum varð tikin upp á Argjum, vigaði 134 kg. Hesin er veiddur við línu, men annars er tað vorðið ein sportur at veiða hemara við tráðu.

## Andlát og jarðarferðir

**Laurensa Nielsen, Strendir**, andaðist á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi týsdagin, 94 ára gomul. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík fríggjakvøldið kl. 19. Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju leygardagin kl. 13.

**Anna Oluffa Sloan, Tórshavn**, andaðist mikumorgunin, 83 ára gomul. Farið verður av Lágargarði fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Ebenezer leygardagin kl. 13.

**Lennhart Berg Niclasen, Tórshavn**, andaðist hósdagin, 76 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Kirkjubøar kirkju leygardagin kl. 11. Sungið verður úr sálmabókini.

Kistan við **Ásu Fríðu Magnhild Midjord** fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi fríggjakvøldið k. 18 í kirkjuna. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Ásu, kunnu lata Hjartafelagnum eina peningagávu, konta í pengastovnunum.

**Kristian Joensen**, vanliga nevndur Kidda, uppi á Lakju, Toftir, andaðist mikunáttina á Landssjúkrahúsinum, 88 ára gamal.

†

Kunngjørt verður, at okkara kæri

**Lenhart Berg Niclasen**
Tórshavn,
ættaður av Velbastað,

andaðist hósdagin, 28. mai 2009, 76 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Kirkjubøar kirkju
leygardagin kl. 11.00. Sungið verður úr sálmabókini.

**Nancy, Sigmar og børnini**

## Tøkk



Eina hjartans tøkk til familju, vinir og kenningar, ið mintust meg á 100 ára føðingardegnum tann 6. mai 2009.
Takk til teir almennu myndugleikar, ið møttir vóru.
Takk fyri heilsanir, gávur og talir.
Eina serstaka tøkk til Lágargarð fyri hjálpina, og øllum, ið gjørdu mær dagin so væl eydnaðan.

**Heilsan**
**Ellen Lützen**